# Minningarhald fyri teir sum fórust við "Immanuel"

MINNINGARHALD

Í hesum døgum eru 75 ár liðin síðan tann stóra sorgarleikin, tá vágssluppirnar Laura og Immanuel gingu burtur í 1932, og 19 menn við hvørjum av skipunum ikki komu heim aftur. Greitt varð nærri frá hesi vanlukku í Miðvikuni í seinastu viku.

Manningin á Immanuel var fyrst og fremst úr Søldarfirði og bygdunum har á leiðini.

Í hesum sambandi verður skipað fyri minningarhaldi í Søldarfirði leygardagin 14. apríl.

Byrjað verður kl. 18 við minnisvarðan í bygdini, sum varð reistur í samband við, at 50 ár vóru liðin síðan hesa vanlukku.

Her fer borgarstjórin Hans Jacob Lamhauge at bjóða vælkomin. Tað verður eisini sangur, og sonur ein teirra, sum fórst við Immanuel, fer at leggja krans og at biðja eina bøn.

Síðan verður farið í skúlan í Søldarfirði, har tað verður borðhald.

Her fara Óli Jacobsen, Dávur Jacobsen, Maria Jacobsen og Sámal Petur í Grund at greiða frá og hugleiða um hesa døpru tíðina hjá øllum okkara samfelagi, tá fleiri hundrað fiskimenn gingu burtur eftir fáum árum. Serliga verður hetta gjørt við atlit til Immanuel og bygdina Søldarfjørð, sum varð so hart rakt í 1932.

Hetta er eitt tíðarskeið, sum við líknandi vanlukkum hevur rakt nógv onnur, og er tískil talan um ein lagnufelagsskap hjá øllum føroyingum.

Øll eru vælkomin til minningar- og borðhaldið leygarkvøldið.



*Leygardagin verður minningarhald við minnisvarðan í Søldarfirði*

## VEÐRIÐ




**Veðrið fríggjadagin**
Skýggjað og támut við regni av og á. Seinnapartin klárar hann tó í. Sunnan og útsynningur, 8 til 13 m/s, onkutíð upp í 15 m/s. Hitin millum 7 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin**
Skýggjað og regn av og á. Útsynningur, 8 til 13 m/s, sum minkar út á dagin. Hitin millum 5 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin**
Yvirskýggjað við regni. Sunnan, 8 til 13 m/s, sum út á náttina snarar í ein útsynning og minkar nakað. Hitin um 10 stig, um náttina 5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin**
Skiftandi skýloft og ælaveður, møguliga sum heglingur. Vestan, 8 til 13 m/s, seinni vestan og útnyrðingur og minkandi. Hitin um 5 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | +14 |
| Nuuk | -2 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | -9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 16 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 5 |
| Moskva | 2 |
| Berlin | 11 |
| Warzawa | 9 |
| Kiev | 10 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 17 |
| Madrid | 15 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 15 |
| Athen | -- |
| Malta | 19 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 17 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 23 |
| New York | 7 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 21 |

## LUFTTRÝSTIÐ







**Veðurlagið**

Lágtrýstini í Atlantshavinum ferðast øll norðureftir móti Íslandi, og tilhoyrandi brúgvaløgini við lýggjari luft og regni koma inn yvir Føroyar sunnaneftir og úr útsynningi. Um vikuskiftið tekur eitt hátrýst seg upp sunnanfyri Ísland, og køld luft streymar inn yvir oyggjarnar av vestri og útnyrðingi.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/4 kl. 06⁰⁰– 12/4. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,0°
Minsti hiti máldur í apríl: -8,7° - Mesti hiti máldur í apríl: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 11/4 kl. 06⁰⁰– 12/4 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í apríl: 47,0 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 3. apríl | Mánin longst frá jørðini |
| 10. apríl | Seinna kvarter |
| 17. apríl | Tendring |
| | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. Apr. | 03.12 | 15.36 | 02.12 | 14.36 | 02.27 | 14.51 | 05.12 | 17.36 | 06.12 | 18.36 | 01.27 | 13.51 | 00.27 | 12.51 | 03.27 | 15.51 | 04.27 | 16.51 | 02.57 | 15.21 | 04.12 | 16.36 |
| 13. Apr. | 03.59 | 16.22 | 02.59 | 15.22 | 03.14 | 15.37 | 05.59 | 18.22 | 06.59 | 19.22 | 02.14 | 14.37 | 01.14 | 13.37 | 04.14 | 16.37 | 05.14 | 17.37 | 03.44 | 16.07 | 04.59 | 17.22 |
| 14. Apr. | 04.44 | 17.06 | 03.44 | 16.06 | 03.59 | 16.21 | 06.44 | 19.06 | 07.44 | 20.06 | 02.59 | 15.21 | 01.59 | 14.21 | 04.59 | 17.21 | 05.59 | 18.21 | 04.29 | 16.51 | 05.44 | 18.06 |
| 15. Apr. | 05.28 | 17.51 | 04.28 | 16.51 | 04.43 | 17.06 | 07.28 | 19.51 | 08.28 | 20.51 | 03.43 | 16.06 | 02.43 | 15.06 | 05.43 | 18.06 | 06.43 | 19.06 | 05.13 | 17.36 | 06.28 | 18.51 |
| 16. Apr. | 06.13 | 18.36 | 05.13 | 17.36 | 05.28 | 17.51 | 08.13 | 20.36 | 09.13 | 21.36 | 04.28 | 16.51 | 03.28 | 15.51 | 06.28 | 18.51 | 07.28 | 19.51 | 05.58 | 18.21 | 07.13 | 19.36 |




Tiltøk í Miðlahúsinum í apríl



- altíð eitt tiltak miðlahúsinum

21. apríl
Javni aðalfund

28. apríl
Aglow